## Verjuleikari til Amager

Anders Qvist, sum í FC Nordsjælland varð mettur at eiga bjarta fótbóltsframtíð, gjørdi í gjár avtalu við Toda Jónsson og FC Amager. – FC Amager er farin undir eina spennandi verkætlan, sum eg fegin vil luttaka og hava ein týðandi leiklut í. Tí eri eg glaður fyri hesa loysnina, hóast tað er við sorgblídni, at eg sigi FC Nordsjælland farvæl. Verjuleikarin hevði í farna kappingarári leiguavtalu við felagið, sum tá bar navnið Fremad Amager, men nú er hann fast bundin at felagnum. Anders Qvist hevur leikt átta SAS-liga dystir, og hevur áður eisini umboðað B93.




## City-eigari í mutur gølu

Thaksin Shinawatra er fyrrverandi fíggjarmálaráðharri í Teilandi, og eigur nú enska felagið Manchester City, sum í komandi viku kemur til Føroya at spæla UEFA-Cup móti EB/Streymi. Í gjár byrjaði eitt sakarmál móti honum, har hann er ákærdur fyri at misnýtt politisku ávirkan, við at stuðla konuni í at keypa ognir frá meginbankanum fyri lítið og lætt. Verða hjúnini funnin sek, kunnu tey fáa upp til 13 ára fongsulsrevsing. Tað er hægstirættur í Teilandi, ið viðgerð sakarmálið, og tað merkir, at Shinawatra-hjúnini ikki hava møguleika at kæra dómin.

# Svøríki




*17 ára gamli brasiliumaðurin Pelé roynir seg við skotið, sum russiski málverjin Lev Yashin vardi fyri. Dysturin varð spældur í Gøteborg tann 15. juni í 1958*

*Mynd: Polfoto*

Brasil, og 23 minuttir seinni legði hann Brasil á odda 2-1.

Í seinna hálvleiki vístu brasiliumenn, og serliga tann bert 17 ára gamli Pelé, so vakurt fótbóltsspæl, at áskoðarnir á Råsunda máttu bara boyggja seg. Pelé økti til 3-1 í 55. minutti, og tá 68 minuttir vóru farnir skoraði Zagallo til 4-1. Sami Zagallo gjørdist heimsmeistari, sum venjari í 1970. Agne Simonsen minkaði um munin til 4-2, tá 80 minuttir vóru leiktir, men tá dysturin var um at verða liðugur gjørdi Pelé eitt hitt vakrasta málið í heimssøguni, tá hann hegnisliga lyfti bóltin upp um tveir verjuspælarar, og bankaði bóltin í netið til 5-2.

Brasiliumenn gingu sigursferð kring Råsunda við svenska flagginum, og vóru teir stórliga fagnaðir av heimaáskoðarunum. Garrincha hevði eisini spælt framúr væl í finaluni, og skrivaði Expressen aftaná dystin:

– Um Garrincha so hevði verið inni í einari telefonboks, so hevði hann kortini megnað at fintað alla tað svensku verjuna.

Ógvuliga stuttliga sagt, men samstundis ein stór viðurkenning til mótstøðuliðið.

### Málríkt

HM-endaspælið í 1958 var sera málríkt. Í teimum 35 dystunum vóru 126 mál skotin, sum gav eitt miðal uppá 3,6 mál fyri hvønn dyst.

Franski framherjin Just Fontaine setti eitt met, sum neyvar nakar nakrantíð fer at megna at taka. Fontaine skoraði heili 13 mál í endaspælinum. Fýra av hesum málunum fullu tá Frakland vann 6-3 á Vesturtýsklandi í bronsudystinum.

Dystirnir vórðu spældir kring alt Svøríki. Fyrireikarnir vildu hava, at fólkið skuldi fáa lut í endaspælinum. Dystir vóru leiktir í Västerås, Uddevalla, Stockholm, Sandviken, Örebro, Norrköping, Malmö, Helsingborg, Halmstad, Göteborg og í Eskilstuna.

Tá í tíðini ferðaðust ikki so nógv fólk til HM sum í dag, men svenski almenningurin tók væl undir við HM-endaspælinum. 919.580 áskoðarar sóu dystirnar, og gav tað eitt miðal uppá 26.274 áskoðarar.

Eitt annað serligt við HM í 1958 var, at øll tey bretsku londini Ongland, Wales, Skotland og Norður-Írland høvdu spælt seg til endaspælið. Tað er fyrstu og einastu ferð, tað er hent. Heldur óvæntað gjørdust tað Wales og Norður-Írland, sum leiktu seg víðari til fjórðingsfinalurnar, meðan Ongland og Skotland máttu pakka niður, aftaná innleiðandi bólkaspælið. Wales tapti heiðurliga 0-1 ímóti Brasil, meðan norðurírar fingu ein sekk uppá 4-0 frá Fraklandi.

HM í 1958 gjørdist eisini fyrsta HM-endaspælið, sum hevði eitt líkinda tal av sjónvarpshyggjarum. Bæði í Svøríki og í øðrum londum vóru tað fleiri, sum keyptu sær eitt sjónvarp á fyrsta sinni. Til stuttleikar kann nevnast, at millum áskoðararnar til HM-endaspælið í 1958 var tann tá bert 16 ára gamli Egil "Drillo" Olsen, sum var farin yvir um markið frá Noregi til Svøríkis, tí hann dyrkaði brasilska spæliháttin. Synd at siga, at Egil "Drillo" Olsen hevur dyrkað henda stílin sum fótbóltsvenjari.

### Harðskapurin tekur til

Sammi idylur var ikki yvir HM-endaspælinum, sum var í Chile fýra ár seinni. Dysturin millum Chile og Italia var so harðligur, at hann er farin í søguna, sum "Slagið í Santiago". Pelé var eisini illa viðfarin í bæði 1962 og í 1966, uttan at nakað munagott var gjørt fyri at verja hann. HM var vorðið nógv tað største tiltakið fyrireikað av monnum, men í takt við vaksandi áhugan, so vaks kynisman og kommersialiseringin eisini. Kortini vaknaði FIFA í 1980-unum, og byrjaði at hugsa um at verja teir bestu spælarnar. Tann parturin er batnaður síðstu endaspølini, men idylurin, sum var í Svøríki, í HM-endaspælinum í 1958 kemur so ongantíð aftur.